# Tín ólavsøka

Pætur Albinus
patur@sosialurin.fo





**Einar Martin Jacobsen, 16 ár**
– Fyrst og fremst haldi eg, at ólavsøkukonsertin er ein góð upphiting til ólavssøkuna. Á ólavsøkuni haldi eg, at kappróðurin er tað størsta. Nú rógvi eg sjálvur, so eftir róðurin fari eg at njóta tað og ein túr í býin at drekka eitt sindur.



**Karla Isaksen, 16 ár**
– Eg havi bara verið einaferð á ólavsøku, og tað var, tá ið eg var lítil. Tað er nokk tann mest spennandi kappróðurin sum er, og har fara nógv fólk at hyggja. Virkar sum eitt sera hugnaligt tiltak, og fari møguliga í ár. Havi ikki havt nakran at sova hjá, og tí havi eg ikki verið har. Um eg fari, so fari eg at hyggja at kappróðri og kanska ein túr á ólavsøkukonsertina.



**Hallur Samuelsen, 18 ár**
- Nú eri eg úr Suðuroy, men mær dámar væl at koma ein túr at hyggja at kappróðri og tosa við vinir og kenningar. Kappróðurin ger munin á einari stevnu.



**Birgir og Linda Carlsson**
- Hon skal arbeiða um ólavsøkuna, og saman skulu vit í tveir føðingardagar. Vit fara ein túr í býin at heilsa uppá vinir og kenningar. Okkum dámar væl hugnan og samveruna, men vit halda at alt ov nógv rúsdrekka fer fram á ólavsøku.



**James Olsen**
*Hvat er tað villasta, tú hevur gjørt á ólavsøku?*
Svomið í Havnará.
Hvat gert tú eftir midnátt á ólavsøku?
Spæli til dans í teltinum í Kommunuskúlanum við Showmonnum. (fyri allar síðstu ferð, hehe)
*Hvat gott skoritriks hevur tú til ólavsøkuna?*
Hey honsjálv, kann eg bjóða tær ein drink, ella vilt tú heldur hava pengarnir?



**Marjun í Kálvalíð**
*Hvat er tað villasta, tú hevur gjørt á ólavsøku?*
Tað villasta eg havi gjørt er helst at renna 5 km á ólavsøku 2005, puha!!!
*Hvat gert tú eftir midnátt á ólavsøku?*
Eftir miðnátt er vanligt at syngja við, vála oman eftir og niðan eftir, práta við fólk, ella at sita gott inni hjá vinfólki og práta og syngja.
*Hvat gott skoritriks hevur tú til ólavsøkuna?*
a) at halda seg rímuliga edrúuan (eingin tímur at fáast við ein sum er skít)
b) ikki lukta av gomlum sprutti og junkfood (tað er ólekkurt)
c) síggja presentabul út, bæði í sinn og skinn.



**Jákup Veyhe**
*Hvat er tað villasta, tú hevur gjørt á ólavsøku?*
Tikið ein blund inn ímillum hevur man nokk, tvætl. Stolið poppkorn!
Hvat gert tú eftir midnátt á ólavsøku?
Veit ikki.
*Hvat gott skoritriks hevur tú til ólavsøkuna?*
Nú havi ikki skorað á ólavsøku, so tað dugi eg ikki at siga tær.



**Jóannes Brøðraberg**
- Fínt tiltak fyri allir aldursbólkar, sum sjálvir sleppa at avgera, hvussu ólavssøkan skal haldast. Sjálvur fari eg til kappróðurin, túr við familjuni, vinum og kenningum. Seinni á kvøldi gongur leiðin oman í býin. Sjálvur haldi eg, at ólavsøkan hevur tørv á fleiri tiltøkum. Fleiri básar, sum hava størri vinningar og ikki bara selja hotdogs.

ólavsøkan 2007

**Útgevari:**
Sosialurin

**Samskipari:**
Theodor E. D. Olsen

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen
Magnus Gunnarsson
Heini í Skorini
Leo Poulsen
Jákup Mørk
Finnur Johansen
Dorit Hansen
Sunva Lassen
Óli Jacobsen
Pætur Albinus
Niels Uni Dam
Petur Háberg
Theodor E. D. Olsen
Heri á Rógvi
Teitur Joensen
Gunn W. Reinert
Jan Müller

**Myndir:**
Sunva Lassen
Álvur Haraldsen

**Lýsingarfólk:**
Gudny Langgaard

**Umbróting:**
Sosialurin

**Prent:**
Dansk AvisTryk a/s